# Útbjóðingartilfar/sølutreytir

## Grundøki í Sandavági til sølu til íbúðarbygging



VÁGA KOMMUNA

**Vága kommuna lýsir við hesum part av matr. nr. 133k í Sandavági, umleið 3.300 m2, til sølu til íbúðarbygging.**

Talan er um tvey ymisk øki. Øki 1 er 1.300 m2 og øki 2 er 2.000 m2.

Hetta er liður í ætlanini hjá Vága kommunu at bjóða ein fjølbroyttan bústaðarmarknað, sum kann nøkta ymiska tørvin hjá borgaranum til bústað.

Tað er upp til tey bjóðandi at koma við uppskoti til, hvussu byggingin verður skipað, og hvat slag av íbúðum verður bygt. Hetta kann vera eigaraíbúðir, leiguíbúðir ella lutaíbúðir. Tilhoyrandi parkering og nøktandi loysnir fyri uttanumøkið er partur av loysnini.

Kommunan setir sum treyt, at tað verða eitt hóskandi tal av íbúðum í verkætlanini. Tað er ein fyrimunur, um byggingin er fjølbroytt við ymiskum íbúðarstøddum, har atlit verður tikið til umhvørvið og útsýnið. Dentur verður lagdur á, at byggingin tekur seg væl út, er í høgari góðsku og fellur væl inn í landslagið.

Bjóðast kann uppá økini hvør sær ella undir einum. Prísurin er kr. 200,- fyri fermeturin.

Fyri søluna er kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn, galdandi.

Grundøkið verður matrikulerað frá, so tað verður sjálvstøðugt matrikulnummar.

Útbjóðingin og sølan er løgd soleiðis til rættis, at tað verður komið fram til bestu loysnina, sum tryggjar eina fjølbroytta og snøgga bústaðarloysn í høgari góðsku, sum tekur seg væl út í umhvørvinum.

Fyrispurningar viðvíkjandi sølutreytunum/ útbjóðingini kunnu sendast til SÓKN Advokatar, att. Eyðbjørn Larsen, adv., Jekaragøta 10, Postboks 258, 110 Tórshavn, telefon 660500 ella 219325 og teldupost eyl@sokn.fo.

Sølutilfarið fæst somuleiðis við at venda sær til SÓKN Advokatar.

Tey, sum vísa útboðnum áhuga, kunnu við at skráseta seg hjá SÓKN Advokatum fáa skrivliga kunning um settar fyrispurningar og svar. Kunningin er navnleys.

Freistin at lata inn skrivlig boð er mikudagin 30. august kl. 12:00.

Sandavágur, tann 25. mai 2023

**Bjarni Prior, borgarstjóri**



# Innihald


**1. Inngangur** .......... **4**

**2. Fortreytir** .......... **4**

2.1 Økini .......... 4

2.2 Atkomuviðurskifti .......... 4

2.3 Tal og stødd av íbúðum .......... 5

2.4 Kloakk og vatnveiting og veitingar og loyvisviðurskifti annars .......... 5

2.5 Fríøki .......... 5

**3. Útbjóðingartreytir** .......... **5**

3.1 Treytir til tilboðsgevarar .......... 5

3.2 Treytir til byggingina .......... 6

**4. Formlig krøv** .......... 6

4.1 Um gjøld .......... 6

4.2 Krøv til tilboð .......... 6

4.3 Fyrispurningar til søluna/útboðið .......... 7

4.4 Metingarstøði .......... 7

4.5 Tíðarætlan fyri útboðið og mannagongd .......... **8**

**5. Fylgiskjal** .......... **9**

# Inngangur

**Fyri útboðið er kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn galdandi.**

Hetta merkir m.a., at Vága kommuna ikki hevur skyldu at taka av nøkrum boði.

Bjóðast kann uppá ognirnar hvør sær ella undir einum.

Tá rætta loysnin er funnin, verður gjørdur keypssáttmáli um økið. Í sáttmálanum verða m.a. treytir um, at keypari fremur verkætlanina innan ávísa freist. Eisini verða settar treytir frá kommununi um m.a. forboð móti at selja víðari, áðrenn bygt er, og rætt til kommununa at keypa lendið aftur fyri sama kostnað, sum selt varð fyri, um tað ikki er bygt innan freistina.

Av tí at talan er um part av matrikulogn, ið verður seld, skal loyvi til sundurbýti fyrst fáast frá Umhvørvisstovuni. Partarnir mugu tí tola treytir og broytingar í víddum í tí sambandinum.

Einstaklingar og feløg kunnu bjóða.

Útbjóðingartilfarið fevnir um hetta skjalið og fylgiskjal 1, dagfest 30. juni 2022, sum er kortskjal yvir økið.

# Fortreytir

## Økini

Økini eru partar av matr. nr. 133k, í Sandavági, sum Vága kommuna eigur. Frábýttu grundøkini verða umleið 1.300 m2 og 2.000 m2 til støddar, sí viðlagda fylgiskjal 1.

Prísurin fyri økið er kr. 200,- fyri fermeturin.

Tað er upp til vinnandi tilboðsgevaran at koma við uppskoti til, hvussu byggingin verður skipað, og hvat slag av íbúðum verður bygt. Hetta kann vera eigaraíbúðir, leiguíbúðir ella lutaíbúðir.

## Atkomuviðurskifti

Atkomuviðurskifti skulu tryggja atgongd fyri øll.

Bygningar skulu gerast og innrættast soleiðis, at teir kunnu nýtast av øllum á ein nøktandi hátt.

Atkomuvegurin til økið verður frá nýggja vegnum, ið er í gerð.

## Tal og stødd av íbúðum

Verkætlanin skal hava hóskandi tal av íbúðum. Ynskiligt er, at íbúðirnar eru í ymiskum støddum fyri at tryggja møguleika fyri fjølbroyttari fólkasamanseting. Tað er ein fyrimunur, at partur av íbúðunum er egnaður til fólk við rørslutarni.

## Kloakk og vatnveiting og veitingar og loyvisviðurskifti annars

Tilboðsgevarin avgreiðir byggiloyvi við byggimyndugleikan hjá Vága kommunu. Byggingin skal fara fram eftir byggisamtyktini fyri økið og annars eftir bygningskunngerðini, BK17.

Kommunan leggur kloakk- og vatnleiðingar at binda í við vegin, og tilboðsgevarin skipar og rindar sjálvur fyri kloakk- og vatnleiðingar annars.

Tilboðsgevarin skipar og rindar sjálvur fyri hitaorkukeldu. Tað er ein fyrimunur, um hitaorkukeldan er umhvørvisvinarlig.

Kommunan tryggjar, at streymveiting er atkomulig. Tilboðsgevarin skipar og rindar sjálvur fyri streymveiting inni á økinum, herundir íbindingargjøld. Tað er ein fyrimunur, um undirstøðukervið er gjørt klárt til eitt nú el-løðistøðir.

Tilboðsgevarin skipar og rindar á sama hátt sjálvur fyri telefon og tøknisamband við avvarðandi veitarar.

## Fríøki

Hóskandi partur av samlaðu útstykkingini skal gerast til fríøki til gagns fyri íbúgvarnar í økinum. Eigararnir av ognunum eiga og reka fríøkið í felag.

Keypari av grundøkinum skal skipa fríøkið sum part av verkætlanini, og skipan av fríøkinum skal góðkennast av Vága kommunu. Kommunan ynskir tí, at tað í innkomnum tilboðum er hugsað um at skipa fríøkið og/ella uttanumøkið soleiðis, at tað verður innbjóðandi, snøgt og væl frágingið.

# 3. Útbjóðingartreytir

## Treytir til tilboðsgevarar

Øll, sum bjóða, binda seg til at byggja og fíggja allar lutir í verkætlanini. Váttan um fígging frá fíggingarstovni skal leggjast við, tá tilboð verður latið inn.

Tað er ábyrgdin hjá tilboðsgevara at skipa fyri, at eigarafelag, eigaraíbúðafelag ella lutaíbúðafelag verður stovnað at taka sær av felags viðurskiftum.

Tilboðsgevari góðtekur, at økið bert kann verða nýtt til íbúðir, og at økið annars verður selt, soleiðis sum tað er og liggur, og soleiðis sum tilboðsgevari hevur havt høvi at kanna tað.

## Treytir til byggingina

Tilboðsgevarar skulu upplýsa, nær teir væntandi kunnu fara undir byggingina, og saman við keypstilboði skal latast uppskot til tíðarætlan fyri verkætlanina.

Grundøkið liggur sambært byggisamtyktini fyri Vága kommunu í økisparti B, sum er sethúsaøki. Byggisamtyktin kann verða tillagað eftir vinnandi uppskotinum.

Byggingin skal vera fjølbroytt við ymiskum íbúðarstøddum, har atlit verður tikið til umhvørvið og útsýnið. Dentur verður lagdur á, at byggingin tekur seg væl út, er í høgari góðsku og fellur væl inn í landslagið.

Byggingin kann verða skipað sum eigaraíbúðir, lutaíbúðir og/ella leigubústaðir.

Byggingin skal verða gjørd samsvarandi góðum handverki. Bygningarnir skulu hava skilagóðan og umhvørvisvinarligan rakstur og orkunýtslu.

# Formlig krøv

### Um gjøld

Tilboðsgevari rindar tinglýsingargjald fyri at fáa sundurbýtið framt hjá matrikkulmyndugleikanum umframt øll íbindingargjøld til SEV v.m.

### Krøv til tilboð

Sølutilgongdin verður skipað soleiðis, at tilboðsgevarar lata Vága kommunu tilboð um keyp av lendinum.

Í tilboðnum skal verða greitt frá, hvussu tilboðsgevari er førur fyri at fullføra verkætlanina, og hvørjir luttakararnir eru, t.e. tekniskir ráðgevar, arbeiðstakarar, fíggjarstovnur v.m. Eisini skal verða greitt frá um neyðugar fakligar førleikar við manning, útgerð og møguligum tilvísingum til aðrar verkætlanir.

Lýsast skal, hvussu tilboðsgevari fíggjarliga megnar at fullføra verkætlanina. Um neyðugt kann kommunan krevja at fáa fleiri ella nágreiniligari upplýsingar um fíggjarligu viðurskiftini, herundir váttan frá fíggjarstovni v.m. og faktisku viðurskiftini hjá tí, ið bjóðar, herundir um eigaraviðurskifti. Slíkar upplýsingar verða viðgjørdar í trúnaði.

Tilboðsgevarar skulu í tilboðnum hava skitsuuppskot, sum lýsir, hvussu økið kann verða skipað við íbúðarbygging,

Skitsuuppkotið skal í minsta lagi fevna um hesar tættir:

(a) Støðumynd í lutfallinum 1:500, sum lýsir byggingina, parkeringsøki, uttanumøki, møgulig fríøki, og hvussu hesi verða skipað.

(b) Frágreiðing um íbúðirnar og støddirnar og um mettan søluprís pr. fermetur fyri bústaðirnar og/ella leigugjald og felagsgjøld.

(c) Yvirskipað tíðarætlan fyri verkætlanina.

Ynskiligt er eisini, at skitsur í lutfallinum 1:200, sum vísa flatmyndir og útsíður, eru við í tilboðnum.

Tilboðsgevari, sum kommunan metir eiga bestu loysnina og best lúka treytirnar í útboðstilfarinum, skal út frá skitsuppskotinum lata kommununi verkætlanaruppskot og frágreiðing um, hvussu bygging verður løgd til rættis og verður útint í verki, áðrenn skeyti kann verða undirskrivað millum partarnar.

Tilboð skal innihalda prís uppá grundøkið og uppskot til tíðarætlan fyri samlaðu verkætlanina.

Ynskiligt er eisini, at skitsur í lutfallinum 1:200, sum vísa flatmyndir og útsíður, eru við í tilboðnum.

Tilboðsgevari, sum kommunan metir eiga bestu loysnina og best lúka treytirnar í útboðstilfarinum, skal út frá skitsuppskotinum lata kommununi verkætlanaruppskot og frágreiðing um, hvussu bygging verður løgd til rættis og verður útint í verki, áðrenn skeyti kann verða undirskrivað millum partarnar.

Tilboð skal innihalda prís uppá grundøkið og uppskot til tíðarætlan fyri samlaðu verkætlanina.

## Fyrispurningar til søluna/útboðið

Møguligir fyrispurningar viðvíkjandi útbjóðingini, mannagongd v.m. verða at seta til SÓKN Advokatar, Eyðbjørn Larsen, adv., á telefon 219325 ella 660500 ella á teldupostadressu eyl@sokn.fo.

Fyrispurningar, sum verða mettir hava generellan áhuga fyri onnur, ið bjóða, verða svaraðir skrivliga, og fyrispurningur og svar verður í navnleysum líki sent til øll, ið hava umbiðið útbjóðingartilfar.

## Metingarstøði

Vága kommuna tilskilar sær rætt at havna øllum tilboðum, eitt nú - men ikki avmarkað til - um kommunan metir innkomnu boðini vera ov langt frá kommunala ynskinum fyri økið, ella um tilboð eftir meting kommununnar í aðrar mátar ikki lýkur krøv í útbjóðingartilfarinum í nøktandi mun. Sama er um tilboð verður mett órealistiskt ella mett verður, at tilboðsgevari ikki megnar uppgávuna.

Tá støða verður tikin til, hvørjum boði takast skal av, verður atlit havt til serliga, men ikki avmarkað til, hesi metingarstøði (raðfylgjan er ikki raðfest, og metingarstøðini eru ikki vektað frammanundan):

1. Hóskandi tal og stødd av íbúðum.

2. Kappingarførur søluprísur ella leigukostnaður fyri íbúðirnar.

3. Byggilist, fjølbroytni og góðska.

4. Umhvørvisvinarligar loysnir.

5. Uttanumøki.

6. Útsýni, útsjónd og atlit til landslagið.

Umsitingin hjá kommununi stendur fyri at gera heildarmeting av innkomnu tilboðunum og leggur tilmæli fyri býráðið um, hvørjum tilboði mælt verður til at taka av.

# Tíðarætlan fyri útboðið og mannagongd

- **2. juni 2023: Kunngerð í bløðunum og á heimasíðunum hjá Vága kommunu og hjá SÓKN Advokatum.**
- **30. juni 2023: Seinasta freist at seta spurningar til ætlanina og útboðið.**
- **7. juli 2023: Kommunan svarar settum spurningum.**
- **30. august kl. 12:00: Freist at lata skrivlig tilboð inn.**
- **30. august 2023: Tilboðsgevarar fáa kunning um, hvussu nógv boð eru innkomin.**

Avgerð um, hvør vinnur útboðið, verður ætlandi tikin av kommununi 2 vikur eftir, at boðini eru latin inn.

Í sambandi við sølu verður avtalað millum partarnar, nær verkætlanaruppskot skal verða latið kommununi. Umsitingin í kommununi tilskilar sær í hesum sambandi, um neyðugt, rætt til at krevja broytingar í verkætlanaruppskotinum fyri betri at náa endamálinum við útboðnum.

Uppskotini verða at lata SÓKN Advokatum, stílað Eyðbjørn Larsen, adv., saman við fylgiskjølum og váttanum v.m. í seinasta lagi mikudagin, tann 30. august 2023, kl. 12:00.

Uppskotini verða at senda til adressuna: SÓKN Advokatar, Jekaragøta 10, Postboks 258, FO-110 Tórshavn, ella á teldupostadressuna: sokn@sokn.fo.

Eisini ber til at lata boðini inn persónliga í móttøkuni á sama bústaði.

# Fylgiskjal

## Kortmynd






VÁGA KOMMUNA